# Ein dyst í senn



*Smílini á VB-kvinnunum vóru stór, tá tær sunnudagin høvdu sett seg umborð á Dúgvuna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast VB við stórsigrinum í Klaksvík tók eitt risa-fet móti gullinum, so er hetta nakað, sum spælararnir sjálvar als ikki vilja gretta orð um**

HONDBÓLTSPRÁT

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*

Tað er einki at taka seg aftur í, at tær sótu væl nøgdar kring borðini umborð á Dúgvuni. VB-kvinnurnar høvdu alla orsøk at smílast, tá tær eftir eitt strævið hondbóltsvikuskiftið aftur løgdu leiðina til Vágs.

Við stórsigrinum á Stjørnuni hevur VB nevnliga lagt seg á odda í bestu kvinnudeildini. Og ikki minst, so mundi dysturin hesaferð geva greiða ábending um, at tað nú eru tær úr Vági, sum skulu roknast sum favorittar til FM-gullið.

## HSF motiveraði

Umborð á Dúgvuni fingu vit orðið á Christinu Holm, sum nú aftur er á VB-liðnum. Og hon duldi ikki fyri, at tær vóru fegnar um sigurin. Ein sigur, sum tær í øllum førum ikki høvdu roknað við, skuldi gerast av hesum dimensiónum.

– Nei. Tað høvdu vit so slettis ikki roknað við. Vit høvdu eisini ein dyst í beinunum frá ígjár, og tað vóru vit eisini bangnar um kundi kosta okkum nakað av kreftum. Men tað riggaði bara tað heila í dag.

Fyri bara tveimum vikum síðani vann VB fyri fyrstu ferð í hálvt annað ár á Stjørnuni. Mann kundi kanska hildið, at hetta gav leikarunum eyka treysti til uppgávuna hesaferð, men tí var Christina als ikki samd í.

– Sjálvt um Stjørnan hevur vunnið nú fleiri ferðir, so hevur talan hvørja ferð verið um javnar dystir. Hvør dystur er eisini ein nýggj uppgáva fyri okkara viðkomandi, so í tann mun haldi eg ikki, at sigurin í hálvfinaluni gav nakað eyka. Skal eg nevna nakra einstaka orsøk, so var tað kanska heldur tað, at vit ilskaðust inn á kappingarnevndina, tí vit skuldu spæla í Vági leygardag og so oddadyst í Klaksvík sunnudag. Tað gav okkum í øllum førum eyka motivatión, helt hon.

## Einki FM-tos

Sum nevnt aðrastaðni, so kann tað væl henda, at sigurin í Klaksvík gevur VB ein eyka fyrimun í oddastríðnum. Trivaligur sum hann var, so merkir hetta helst, at Stjørnan nú í øllum førum skal hava trý av fýra stigum móti VB í endaspælinum, um tær ætla sær at enda ovast, men slíkt tos vildi Christina Holm so slettis ikki hoyra talan um.

– Hatta hava vit so ikki tosað um. Vit taka ein dyst í senn. Sjálvandi við tí fyri eyga at vinna hvørja ferð. Nú hava vit enn eina hálvfinalu mikudagin, tá vit aftur skulu til Klaksvíkar.

*Og tað verður kanska ein øðrvísi dystur?*

– Tað rokni eg við. Eg rokni eisini við, at tær í Stjørnuni nú vilja vísa nakað, men tað mugu vit so bara taka við. Vit vilja altíð stríðast fyri okkara søk, og so mugu vit bara vóna, at tað er nóg mikið, staðfesti strikuspælarin hjá VB at enda.

Stjørnan-VB 2

# Stjørn

**Var talan um nakrar stjørnur í Klaksvík sunnudagin, so vóru tað í øllum førum ikki tær á hondbóltsliðnum. VB vann nevnliga ein knúsandi stórsigur í oddabrakinum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*

*Myndir: Álvur Haraldsen*



Ein stúgvandi full KÍ-høll hevði helst roknað við einum øðrum úrsliti enn tí, sum gjørdist veruleiki sunnudagin. Og í øllum førum mundu tey roknað við, at talan skuldi gerast um ein spennandi dyst millum tey bæði fremstu kvinnuliðini í landinum. Og hartil tvey lið, sum ferð eftir ferð tey nógvu seinnu árini hava serverað nakrar av bestu kvinnudystunum í landinum fyri áskoðarunum.

## Bremsaðu kontraspælinum

Ein av orsøkunum til hetta er ivaleyst, at liðini bæði hóska væl til hvørt annað. Báðum dámar teimum at leggja dent á skjótan hondbólt, har stórur dentur verður lagdur á kontraspælið, og soleiðis tóktist tað eisini at skula gerast hesaferð. Í øllum førum fyrsta korterið ella so.

Tað var eisini greitt, at báðir partar gjørdu nógv, til tess at mótstøðan ikki skuldi fáa gongd á hetta vápnið. Ikki minst var tað imponerandi at síggja returrenningarnar hjá VB. So skjótt sum skotið varð móti málinum, vóru tað hvørja ferð einar tríggjar ella fýra av VB-spælarunum, sum við fullari ferð runnu aftur, og hetta hevði so eisini við sær, at Stjørnan als ikki fekk gongd á sítt kontraspæl. Málið til 1-0 kom gott nokk eftir kontra, men so var steindeytt teir seinastu 58 minuttirnar!

Fyrstu løtuna fekk VB heldur veruliga gongd á sítt kontra-spæl. Tað hevði so við sær, at báðir partar noyddust at spæla meira upp á bakspælararnar, enn tey vanliga gera. Hjá Stjørnuni tóktist hetta rigga betri fyrstu løtuna, tá Katarina, Alina og Joan fleiri ferðir sýndu skjótt og gott samanspæl. Hjá VB gekst nakað tyngri hesa fyrstu løtuna. Nógv tóktist liggja á herunum á Auksu, sum fleiri ferðir royndi at bróta ígjøgnum, men sum dysturin leið, so tóktist júst hetta fáa avgerandi ávirkan.

## Statiskur venjari

Hetta hevði nevnliga við sær, at Stjørnan fekk lyndi til bara at hugsa um Auksu, og tað var so ikki nakað gott hugskot. Skotsterki litavin dugir nevnliga eisini at síggja viðleikararnar, og tá plássið til fríspælingar gjørdist betri, fullu hesar alsamt títtari, soleiðis at Arnleyð, Christina og Daiva fingu nakað nógv betri pláss, enn ráðiligt var.

Tað var eisini merkisvert í hesum, hvussu Stjørnan alla tíðina helt fast við útgangsstøði í verjuni. Kann væl vera, at tað vildi givið Daivu ov góðar treytir, um valt varð at verja flatt, men tað vildi verið ein roynd vert. Stjørnuverjan stóð støðugt ov nógv á hælunum, og tá gjørdist talan ofta um millumstøður, sum í hópin av førum førdu brotskast til VB við sær. Ikki minst gjørdist Una stóri syndarin í hesum, men tað skal hon so langt ífrá einsamøll lastast fyri. Snøgt sagt, so varð hon ov ofta seld av viðleikarunum, og tí stóð valið millum at gera brotskast, ella at lata leikaran fara.

Heldur enn at fremja broytingar í hesum, so valdi Stjørnan alla tíðina at halda fast við útgangsstøði, og hetta kom at kosta teimum dýrt.

Seinastu løtuna undan